# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Føðingar



*14. oktober fekk Sarah, 2 ár, eina lítlasystir, sum eitur Emma. Hon vigaði 3646 gr og var 52 cm long. Foreldrini eru Anja Frederiksberg Vesth og Thomas Vesth. Tey búgva í Odense.*



*Hej. Eg eiti Døgg Petursdóttir. Eg varð fødd 14. oktober. Eg vigaði 3200 gram og var 50 cm. Foreldrini hjá mær eita Birita Hansen og Petur Pólsson Jensen. Tey búgva í Sandavági.*



*15. oktober fekk Janita, 3 ár, eina lítlasystur. Hon var 50 cm long og vigaði 3470 gr. Foreldur teirra eru Morit Eliassen og Fróði Sivertsen, Esbjerg*



*Herfyri var lítli Jóhan úr Kerteminde fyri fyrstu ferð í Føroyum og vitjaði ommu og abba sín í Fuglafirði. Hann er føddur tann 26. mars í ár, og mamma og pápi hansara eita Sólrun og Ulrik Martinussen. Mamma hansara er úr Fuglafirði og er dóttir Victoriu og Ivan Jacobsen. Jóhan er uppkallaður eftir mammubeiggja sínum, sum fyri 20 árum síðani doyði í ferðsluvanlukku. Í 1988 fór Sólrun niður til Kerteminde at nema sær útbúgving, og í 1997 giftist hon við Ulrik, sum er haðani. Sólrun starvast í dag sum undirstjóri í einum barnagarði í Munkebo, og Ulrik starvast á einum boripalli í Norðsjónum.*

19. oktober fingu Martha og Andrias Hammer, Klaksvík, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3500 gr.

21. oktober fingu Alexandra Bech og Allan Bjarnason, Hjørring, eina dóttur. Hon var 45 cm long og vigaði 1820 gr.

22. oktober fingu Hjørdis og Dánjal Petersen, Kollafirði, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3700 gr.

24. oktober fingu Inga og Vinjard Magnussen, Sørvági, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3825 gr.

24. oktober fingu Rannvá á Reyni og Brian Eskildsen, Tórshavn, ein son. Hann var 49 cm langur og vigaði 2750 gr.

25. oktober fingu Sigbjørg og Poul Sivar Olsen, Hvannasundi, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4000 gr.

26. oktober fingu Beinta Larsen úr Tórshavn, og Sakaris Dimon úr Porkeri, búsitandi í Keypmannahavn, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 4200 gr.

26. oktober fingu Tórur og Jóhann, synir Rúnu og Adrian Fløtt av Eiði, eina fitta systur. Hon var 54 cm long og vigaði 3900 gr.

26. oktober fingu Marita Mohr Hermansen og Páll Nolsøe Slættanes, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 4310 gr.

27. oktober fingu Elinbjørg Hammer og Eivind Hansen, Runavík, eina dóttur. Hon var 50 cm long og vigaði 2850 gr.

28. oktober fingu Ketty og Kristian Hentze, Sandi, eina dóttur. Hon var 58 cm long og vigaði 4050 gr.

## Dagurin

**30. oktober. Absalon**. Er navnið á soni Dávids (2. Sám. kap. 13-18).
Bíbilska navnið merkir *faðir at friðinum.*

**31. oktober. Upphav trúbótar Luthers**. Eftir trúbótina koma, sum vera man, eingi nýggj halgimenni upp í álmanakkarnar, men luthersku álmanakkarnir varðveita tey gomlu nøvnini og taka eisini við tey nýggju katólsku nøvnini. So verða eisini ymiskar søguligar hendingar nevndar, m.a. dagurin 31. oktober, sum verður hildin til minnis um, at *Martin Luther* setti sínar 95 setningar upp á slotskyrkjudyrnar í Wittenberg.

**1. november. Alla halganna dagur**. Longu í aðru øld var siður at halda minningardag hjá hvørjum einstøkum blóðvitni á deyðadegnum, men umleið ár 350 varð samtykt at halda minningardag fyri øll ein dag í árinum, og var hann fyrsta sunnudag eftir hvítu-sunnu.
Pávin Gregorius III ásetti í 731, at dagurin skuldi verða hildin 1.. november. Hann varð róptur Festum omnium sanctorum, hátíðardagurin hjá øllum teimum heilagu. Eftir trúbótina varð hann avtikin sum fastur halgidagur og varð í kirkjuárinum ásettur til fyrsta sunnudag eftir fyrsta november, men 1. november varð standandi eftir í álmanakkanum.
Løgtingið samtykti í 1949, at 1. november skuldi verða hildin sum *minnisdagur teirra sjólætnu.*

Havnar Svimjifelag:

# Olaf á Stongunum vann Peugeot skutaran

**Týsdagin 26. oktober handaði formaðurin í Havnar Svimjifelag, Hans Andrias Djurhuus, ein Peugeot skutara, sum var vinningurin ið felagið lutaði burtur í samband við eina ferð til Aberdeen**




*Týsdagin varð Peugeot skutarin handaður hjá PM-Føroyar av formanninum í Havnar Svimjifelag til Jóan Petur, sum er sonur Olaf á Stongunum, hann situr uttast til vinstru. Hinir eru: Hans Andrias Djurhuus, formaður í Havnar Svimjifelag, og John J. Hansen og Rói Bjarnason Poulsen, frá PM-Føroyar*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Frá 7. til 14. oktober 2004 vóru 23 svimjarar úr Havnar Svimjifelag í Aberdeen, har tey vóru á venjing-arlegu saman við svimjarum har í býnum.

Felagið fekk 40.000 krónur úr grunninum, sum er fyri vinarbýirnar Tórshavn og Aberdeen. Men tað var ikki nokk, og neyðugt var at útvega meira pening, um ferðin skuldi blíva veruleiki.

Fyritøkan PM-Føroyar stuðlaði felagnum við einum Peugeot 206 WRC skutara til at luta burtur. Lutaseðlilin var ein lykil fyri 50 krónur, sum skuldi passa í eitt lás á skutaranum. Av øllum lyklunum var tað bert ein sum passaði.

Hepni vinnarin var Olaf á Stongunum í Havn, hann hevði keypt tveir lyklar, og annar passaði í lásið.

Saman við Peugeot skutaranum var vinningurin eisini tveir hjálmar og eitt sett av handskum til eitt virði av tilsamans 26.000 krónum.

Hans Andrias sigur, at felagið fekk góðan stuðul frá t.d. PM-Føroyar, Suðuroyar Sparikassa og fleiri øðrum fyritøkum.

Svimjararnir vóru sera væl nøgdir við ferðina og fingu nógv burturúr. Endamálið er at skapa vinarbond millum svimjarar í báðum býunum, og vit síggja fram til at fáa vitjan av svimjarum úr Aberdeen, sigur Hans Andrias.

Hann sigur víðari, at teir høvdu verið fegnir, um tey sum keyptu lyklar kundu gjørt felagnum tann beina at lata teir inn aftur. Lyklarnir eru dýrir at keypa, og kunnu teir væl brúkast aftur til ein annan vinning.

## Prógv

Arin Joensen úr Kaldbak, men sum nú býr á Møn við familju, bleiv í august útlærdur til skipara í 3. grad á »Søfartsstyrelsens skole« á Fanø.

Elisabeth Eið Eliasen, Viborg, hevur lokið prógv sum heilsurøktari við Sosial- og Sundhedsskolen, Skive.

Signar Petersen úr Sandavági hevur tikið djóralæknaprógv (Cand. med. vet.) á Den Kongelige Veterinær- og Landbohøjskole í Keypmannahavn.



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Johannes Holm Jacobsen 80 ár

Leygardagin 30. oktober verður Johannes Holm Jacobsen, Hvalba, vanliga nevndur Hannis, 80 ár. Foreldur hansara vóru Elisabeth, f. Poulsen, við Neyst úr Hvalba og Jákup Jacobsen, ella Jákup í Skálavík, sum hann vanliga varð kallaður. Tey vóru 5 systkin og er Hannis yngstur. Bert 9 mánaðar gamal misti hann móðurina av nátasjúkuni, so stutt eftir kom Oluffa av Trøllanesi suður at halda hús hjá teimum nøkur ár, og eftir hana var Margith gift Nielsen, sum nú býr á Eiði.

Hannis varð giftur við Alice, f. Berg, úr Nesi í Hvalba. Tey fingu 2 børn, Jónu, sum er búsitandi í Hvalba og Dávur, sum er búsitandi í Tórhavn. Barnabørnini eru 7 í tali. Alice flutti heim til Harran í bestu árum, bert 52 ára gomul.

Sum yrki hevur Hannis havt lastbilkoyring, og hevði hann lastbil í yvir 40 ár. Í flest øll hesi ár tók hann sær av øllum vøruflutninginum til og frá Strandferðsluskipunum. Fyrst í sjálvari bygdini Hvalba og seinni, tá tunnlarnir komu, eisini millum Hvalba og Tvøroyri og til seinast millum Hvalba og Sandvík.

Eftir at tunnlarnir høvdu bundið saman bygdirnar Sandvík, Hvalba og Tvøroyri, byrjaði hann at koyra vøru til Hvalbiar og Sandvíkar fyri Poul Hansen Heilsølu og Richard B. Thomsen Timburhandil, sum hildu til á Tvøroyri, og helt hetta áfram til teir fingu sær egnar flutningsbilar.

Sum flest aðrir, sum høvdu lastbil, tá kolagrevsturin í Hvalba var í hæddini, so koyrdi Hannis kol til skipini, sum komu á Hvalba eftir koli. Eftir at kolaflutningurin bleiv broyttur soleiðis, at alt kol bleiv avskipað í sekkjum,



og Strandferðslan tók sær av flutninginum millum oyggjarnar, helt Hannis áfram við at koyra kol til Smyril. Eisini var hann eitt skifti stjóri í Roynds Kolasølu.

Hannis hevur fingist við seyð, síðani hann var smádrongur og hóast høgan aldur, fæst hann fremvegis við seyð. Hann hevur verið seyðamaður í fleiri hagapørtum, og í einum av hagapørtunum var hann seyðamaður í yvir 50 ár. Síðani Hannis var 16 ára gamalur hevur hann sett eplir niður á hvørjum ári, og hevur hann júst tikið eplini upp fyri í ár.

Hannis hevur tann eginleika, at hann er sera røkin maður, og hevur hetta við sær, at hann keðir seg aldrin, hann finnur altíð uppá okkurt at takast við. Um veturin, tá ikki so nógv er at fáast við í bø og haga, fæst hann við ymiskt handaligt arbeiði í kjallaranum.

Andaliga heim sítt hevur Hannis í Vitninum í Hvalba, og hevur Zarepta eisini eitt stórt pláss í hjarta hansara.

Á hesum merkisdegi ynskja vit honum Harrans signing.

Dagurin verður hildin í Vitninum leygardagin 30. oktober frá kl. 18.00.

## Tøkk

Hjartaliga takki eg tykkum øllum, ið gleddu meg á 80 ára degnum 23. juni.

Tøkk fyri gávur, blómur, fjarrit, kort og telefonsamrøður.

Takk fyri røður, sangir og hornblásturin og tykkum, ið vundu Merkið á stong.

**Kittan Poulsen, Fuglafirði**

## Tøkk

Eg vil hervið bera eina hjartans tøkk til børn, verdóttir, ommu- og langommubørn míni, sum vóru saman við mær á 95 ára føðingardegnum 23. september.

Tøkk fyri blómur, uppringingar, fjarrit og vitjanir aftaná føðingardagin.

Eisini bygdafólk mítt fær eina hjartans tøkk fyri hjálpsemi og gott vinalag øll hesi mongu ár.

Bestu heilsur við Sálm. 59,18

**Anna Jensen, Hellurnar**

Jonhild V. Eysturberg, Hvalba:

# 30 ára starvsdag sum heimahjálpari

18. august 2004 hevði Jonhild V. Eysturberg í Hvalba arbeitt í 30 ár sum heimahjálpari.

Tað er ein long arbeiðstíð, ið ikki øll náða, hon hevur upplivað hvørt av sínum, og nógvar broytingar og sparingar hava verið, ikki man tað hava verið so lætt at umstilla seg hvørja fer.

Jonhild, sum í dag er 59 ára gomul, hevði sín fyrsta arbeiðsdag sum heimahjálpari 18. august 1974 í Hvalba.

Hon hevur luttikið á nógvum skeiðum og verið í nevndini hjá Heimahjálparafelaginum

Jonhild fór til uppskúling



*Jonhild V. Eysturberg (h.m.) saman við sínum fyrsta brúkara, Ninnu Holm í Hvalba. Myndin er tikin á 25 ára starvsdegnum hjá Jonhild*

á Heilsuhjálparaskúlanum á Tvøroyri 58 ára gomul í 2002, og kláraði hon hetta gott. Hon hevði gott mót og kláraði skúlan fyrimyndarliga. Hon er so heilsuhjálpari í dag og arbeiðir á Eldra Sambýlinum í Hvalba.

Jonhild er gift við Fríðálvi Eysturberg, og eiga tey 4 døtur.

## Tøkk

Hjartaliga takki eg tykkum øllum, sum gleddu meg á 80 ára føðingardegnum.

*Kærar heilsanir*

**Ingibjørg Johannesen**

## Andlát

22. oktober
Karl Herup Olsen í Tórshavn, 86 ár.
Gordon Johannesen, ættaður frá Gjógv, búsitandi í Tórhavn, 71 ár.
Súsanna á Brúsoyri, í Tórshavn, ættað úr Leirvík, 57 ár.
Bjarne Ellingsgaard, ættaður av Eiði, búsitandi í Esbjerg, 71 ár.

23. oktober
Niels Petersen, Kaldbak,
Mourits Joensen í Havn, ættaður úr Hvalvík, 101 ár.

24. oktober
Åge Ellendersen, ættaður úr Hvalba, búsitandi í Havn, 75 ár.

25. oktober
Bernhard Hammer, Eiði, 88 ár.

## Tøkk

Tøkk til tykkum mongu, ið fylgdu mínum kæra manni

**Andreasi Skipanes**

til hansara seinasta hvíldarstað,
tann 22. august 2004.

Tøkk til tykkum, ið mintust hann á annan hátt.
Takk, Uni Næs prestur, fyri troystarrík orð
á Røktar og Ellisheiminum, og tøkk, Meinhard
Bjartalíð fyri vøkur orð í Glyvra kirkju
– orð, ið fløvaðu.
Tøkk til berarar, sangarar og kirkjutænarar.
Tøkk til starvsfólkini á Eysturoyar Røktar og Ellisheimi
fyri ta stóru umsorgan, tit altíð vístu honum,
ta tíðina, hann var har.
Harrin signi tykkum øll.

**Marin Skipanes**